## UPPLATINGARTILBOÐ




**Byggitilfar til verksmiðjuprísir**

**Millum annað:**

**Dygdar trægólv við 15 ára slitgaranti**

10 mm plank/ask **249,- kr. m2**
22 mm askur **349,- kr. m2**

**Granitflisar**

10 mm poleret 30 x 30 **225,- kr. m2**

Kom og síggj framsýningina, við millum annað ymisk sløg av vindeygum og hurðum.

**Opið er:**
Gerandisdagar kl. 15.30 - 18.00
Leygardagar kl. 13.00 - 18.00

**BYGGITILFAR**

Hákunargøta 6 · 188 Hoyvík · Tel 310006 · Fartel 510006
Fax 317007 · www.byggitilfar.fo

# Grundøki Yviri við Strond



Um nóg høgt boð fæst, selja vit eitt grundøki, sum liggur Yviri við Strond.

Stykkið er óbygt, men partvíst planerað til parkeringsøki, hevur heitið matr. nr. 620 u, Tórshavn, og er til støddar uml. 1.400 m2.

Sambært byggisamtyktini liggur stykkið í 2. grundumráði, sum er lagt til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, e-mail ojk@jura.fo ella Elina Svínoy, e-mail els@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
**Tlf. 311145**

## Almenn skeið á Fróðskaparsetri Føroya 2005-2006

# Próvskeið í enskum

a) Skeið til Cambridge First Certificate in Advanced English byrjar á *Fróðskaparsetrinum, Ovastovu, Nóatúni 3, 100 Tórshavn* 20. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.

- Fortreytir: Miðnámsstigi A/B ella samsvarandi kunnleiki, eitt nú Cambridge FCE-royndin, førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English byrjar á *Føroya Sjómansskúla, Krákugjógv 5, 100 Tórshavn* 19. oktober í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið »Advanced English«, málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2006.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **30. september 2005**. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 650 kr.**

Fyri próvtøku í First Certificate gjalda næmingar 900 kr. og fyri próvtøku í Proficiency 1000 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

# Jørð í Vestmanna

Til sølu er eitt óbygt jarðarstykki til víddar gott 15.000 m².

Stykkið hevur heitið matr. nr. 45 z, Vestmanna, og liggur omanfyri nýggju útstykkingina í Vestmanna.

Sambært byggisamtyktini er talan um landbúnaðarøki.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
**Tlf. 311145**
**att: Óla Jákup Kristoffersen, advokatur, e-mail ojk@jura.fo**
ella **Elin Svínoy, e-mail els@jura.fo**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til dagdeildina »Varðan«

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi til psykiatrisku dagdeildina »Varðan« at byrja 1. oktober 2005 ella skjótast tilber. Starvið er eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 0,5.

Deildin er ein psykiatrisk viðgerðardeild til fólk, sum hava tørv fyri stutt-, langtíðar- ella viðlíkahaldsviðgerð, meira enn gevast kann ambulant. Deildin er ein miljøterapeutisk deild, har arbeitt verður við kontaktpersónsskipanini. Vit eru 2,5 starvsfólk á deildini og vit raðfesta samarbeiði, trivna og fakliga menning høgt.

**Krøv til umsøkjarar:**
- góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir og kunnleika innan psykiatri
- góð samstarvsevni
- megna at arbeiða sjálvstøðugt
- kreativur

**Vit kunnu bjóða:**
- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tætt tvørfakligt samarbeiði við aðrar starvsbólkar.

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Mariu Anderssen, deildarleiðara telefon 304500, lokal 4014 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 28. september 2005 kl. 12.00. Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Vit sóknast eftir royndum skipara

til íslendskan bát sum fer á svartkalvaveiðu við Ísland.

Áhugað kunnu venda sær til:

**tlf.** **00354 8568493**
**e-mail:** **gauikri@visir.is**